# Vilja hava sernámsdepil í miðnámsskúlanum í Vági



*Nú miðnámsskúlin verður fluttur til Hovs, hevur Vágs Býráð mælt landsstýrinum til, at húsið, her skúlin er í nú, verður brúkt til sernámsdepilin, sum allar kommunurnar í Suðuroy hava søkt landsstýrið um at fáa í oynna. Mynd. Dagfinn Olsen*

**Nú kommunurnar í Suðuroy hava heitt á landsstýrið um at skipa ein sernámsdepil í Suðuroy, vóru vágbingar skjótir at lofta bóltinum**

SERNÁMSDEPIL

*Áki Bertholdsen*
aki@sosialurin

Vágbingar vóru skjótir á sjóvarfallinum, nú allar kommunurnar í Suðuroy hava heitt á landsstýrið um at gera ein sernámsdepil í Suðuroy.

Tað er ein vika síðani, at kommunurnar í Suðuroy handaðu landsstýrinum eina umsókn um at fáa ein sernámsdepil í Suðuroy og nú hevur Vágs Býráð eisini víst á, hvar hann kann vera.

Ein sernmsdepil er skipaður í Eysturoy og kommunurnar í Suðuroy heita nú á landsstýrið um at Suðuroy til tað næsta royndarøki í hesum sambandi.

Kommunurnar hava tí boðað Jógvani á Lakjuni, landsstýrismanni í skúlamálum frá, at tær eru fúsar at samstarva um eina royndarskipan og tá ið landsstýrismaðurin fekk umsóknina, lovaði hann at viðgera hana við vælvild.

Men eitt er at bjóða seg fram at hava ein sernámsdepil í Suðuroy, eitt annað er at finna útav, hvar hann skal vera.

Í hesum sambandi bóru vágbingar skjótt at.

Á býráðsfundi í Vági skeyt Dánjal Bjarkhamar, býráðslimur, upp, at Vágs Kommuna vísti landsstýrinum á eini hús í Vági til at húsa sernámsdeplinum í.

Og hann hevði eisini uppskot um, hvar depilin skuldi vera.

- Nú ætlanin er at flyta miðnámsskúlan til Hovs, fer húsið, sum miðnámsskúlin í Vági er í, at standa tómt. Tí skeyt býráðslimurin upp, at kommunan vísti landsstýrinum á, at sernámsdepilin kann fáa innivist í miðnámsskúlanum í Vági til sernámsdepil.

- Tað er eitt rúmligt hús, ið er bygt til skúla. Tað er eisini eitt hús, sum er beint við Vágs Skúla og tí er skjót atgongd til fakhøli av ymsum slagi, samstundis sum húsið er í einum skúlaumhvørvi. Tí hevði sernámsdepilin fingið framúr góðar umstøður har, segði Dánjal Bjarkhamar.

- Júst atgongdin til fakhøli av ymsum slagi, varð stóru dentur lagdur á, tá ið sernámsdepilin í Eysturoy var skipaður, vísti Dánjal Bjarkhamar á.

- Tað er eisini eitt hús, sum er nýliga høvuðsumvælt og sostatt er tað í góðum standi.

Og at enda vísti hann á, at talan er um eitt hús, sum Mentamálaráðið longu eigur, so tað skuldi ikki verið nakað í vegin fyri at tikið tað til endamálið, legði hann afturat.

Hetta hildu allir býráðslimir vera eitt gott hugskot og sostatt tók býráðið einmælt undir við uppskotinum um at mæla landsstýrinum til at leggja ein komandi sernámsdepil í Suðuroy í húsinum, har miðnámsskúlin nú er.

# Norðoyingar fáa eisini ellis- og røktarheim



*Eldrarøktin hevur fingið eina rættiliga innspræning, og vilja norðoyingar, fáa teir eisini studning, og so er allur tørvurin nøktaður*

**Hóast studningspuljan til ellis- og røktarheim er uppi, er politisk semja um at lata eyka studning til eitt heim í Norðoyggjum, skuldi ein umsókn komið haðani**

ELLIS- OG RØKTARHEIM

*Áki Bertholdsen*

aki@sosialurin.fo

Fríggjadagin gjørdi Almanna- og heilsumálaráðið av, hvørjar kommunur skuldi fáa studning úr landsstýrinum til at byggja ellis- og røktarheim og sambýli.

Tilsamans vórðu 151 milliónir játtaðar í stuðuli til at byggja eldrabýli í Suðuroy, Suðurstreymoy, Norðstreymoy, Eysturoy og í Svínoy.

Sostatt er øll upphæddin brúkt, sum er sett av til endamálið.

Einasta økið, har stórur tørvur framvegis er á útbygging er í Norðoyggjum.

Og Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, sigur, at hóast øll puljan nú er uppi, er kortini politiskur vilji til at játta stuðul til eitt heim í Norðoyggjum, skuldi ein umsókn komið haðani.

Hann sigur, at bæði samgongan og landsstýrið hevur játtað, at kemur ein umsókn um at byggja ellis- og røktarheim í Norðoyggjum, skal tann umsóknin eisini gangast á møti.

- Vit hava eina verklagslóg, sum gevur okkum heimild at at lata 151 milliónir í studningi úr landskassanum til at byggja ellis- og røktarheim fyri tey næstu trý árini og tær eru longu brúktar.

- Men kemur ein umsókn úr Norðoyggjum u mat byggja ellis og røktarheim til 20 pláss, eru vit samd um at broyta verklagslógina, so at eisini hon kann gangast á møti.

## Loysir ein stóran trupulleika

Hans Pauli Strøm sigur, at í løtuni er størstu trupulleikin hjá eldrarøktini, at tað er so stórt trot á røktarheimum.

- Trupulleikin er, at heimarøktin noyðist at brúka bróðurpartin av tíðini til brúkarar, sum eru so røktarkrevjandi, at teir í veruleikaum áttu at verið á stovni.

- Tað merkir so aftur, at tað er ikki nóg nógvar tímar til tey fólk, sum heimarøktin er ætlað til, nevniliga at hjálpa teimum, ið bara krevja eitt sindur av stuðuli, til at vera heima sum longst.

- Og tá ið tey fáa so lítlan stuðul, verða tey skjótari so vánalig, at tey verða røktarsjúklingar.

Hans Pauli Strøm sigur, at fáa vit bygt tey røktarheim, sum nú eru í umbúna, fáa vit lætt um hjá heimarøktini, við tað, tey, sum krevja ov nógva røkt, fara á røktarheim. Sostatt fær heimarøktin umstøður at vira, soleiðis sum hon varð ætlað, altso.

- Samstundis kunnu sambýlini, sum nú eru mestsum røktarheim burturav, í framtíðini virka, sum tey vórðu ætlað til, nevniliga til tey, sum so dánt klára seg sjálvi.

## Tørvurin nøktaður

Tað, sum stuðul annars er latin til, er byggja ellis- og røktarheim við Hoyvíkstjørn til 24 búfólk, røktarheim á Boðaneshamri til 24 búfólk, umframt reststuðul til røktarheimið Tjarnargarð. Harumframt hevur Tórshavnar Kommuna søkt um stuðul til sambýlið í Mattalág, men almanna og heilsumálaráðið góðkennir ikki tað til sambýli. Ístaðin verður stuðul latin til at gera tað til eitt umlættingarheim.

Í Suðuroy verður studningur latin til at byggja eldrasambýli á Tvøroyri til 16 búfólk og røktarheim í Vági til 24 fólk.

Í Sørvági er studningur latin til at byggja eldrasambýli til 10 búfólk og Vestmanna fær stuðul til at byggja ellis og røktarheim til 24 fólk.

Í Norðoyggjum hevur Svínoy fingið stuðul til eitt eldrasambýli til 8 fólk.

Í Eysturoy er stuðul latin til at víðka eldrasambýlið í Gøtu frá 10 til 16 fólk.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum sigur, at kemur ein umsókn úr Norðoyggjum, er sostatt studningur latin til 166 pláss á ellis- og røktarheimum og á sambýlum hesi næstu trý árini.

- Tá er tørvurin á eldrabýlum nøktaður, tí ein tørvskanning vísir, at tørvur er á 151 plássum í øllum landinum, sigur hann.

# Krevur at Løgtingið verður kallað saman

**Miðflokkurin heitir nú á Løgtingsformannin at kalla Løgtingið saman at fáa kunning um skuldsetingarnar frá fyrrverandi forkvinnuni í Framtaksgrunnium ímóti Bjarna Djurholm og øðrum fólkafloksmonnum**

POLITIKKUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er neyðugt, at Løgtingið kemur saman at viðgera støðuna, so at fólkaræðið kann verða endurreist.

Tað siga teir báðir løgtingsmenninir fyri Miðflokkin, Jenis av Rana og Bill Justinussen.

Tað, sum teir sipa til, eru skuldsetingarnar frá fyrrverandi forkvinnuni í Framtaksgrunninum, Dagmar Joensen, ímóti landsstýrismanninum í vinnumálum, Bjarna Djurholm og øðrum fólkafloksmonnum.

Tier hava sostatt skrivað Edmund Joensen, Løgtingsformanni, skriv, har teir heita á hann um at kalla Løgtingið saman sum skjótast at viðgera støðuna.

- Fjølmiðlar hava seinastu daganar borið ófrættatíðindi um, hvussu landsstýrismaður og politiskur flokkur beinleiðs blandar seg upp í - og leggur trýst á leiðslur í almennum partafelag, ella feløgum, , fyri at fremja egin politisk áhugamál, sigur Miðflokkurin.

Harnæst tykist løgmaður, sum ovasti mynduleiki hjá landsstýrinum og landsstýrismonnum, enn einaferð at velja lættastu loysnina, og letur umtalaða flokki stýra Føroyum, heldur flokkurin fram. - - Tá so er, metir Miðflokkurin at løgtingsmenn, valdir av Føroya fólki at stjórna landinum, mugu verða kunnaðir, fáa høvið at viðgera støðuna og taka neyðugar atgerðir fyri at endurreisa fólkaræði, sigur Miðflokkurin.